FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# NÁMSFRØÐINGUR

## TIL FRÍTÍÐARSKÚLAN "KAMBUR", AT BYRJA 15. MARS 2010.

Kambur er stovnur, ið veitir heildags tilboð til 6 ára gomul børn og frítíðarskúlabørn.

Vit hava brúk fyri tær.

**Vit sóknast** einum námsfrøðingi, ið hevur dirvið at seta dagsskránna, bæði fyri tey 6 ára gomlu og frítíðarskúlabørnini. Vit vænta tí at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, ert ja-lig/ur, dugir at samstarva, tekur ábyrgd og dugir at seta tær mál.

**Vit bjóða** eitt spennandi starv, ið støðugt er í menning, har tú kanst verða við at mynda og seta tín dám á stovnin. "Kambur" liggur í einum náttúruríkum umhvørvi, har ið náttúran náttúrliga setur sín dám á gerandisdagin.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er 30 tímar um vikuna.

Starvið verður sett 15. mars.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Lønarstig 11-18

Arbeiðstíð, mánadag til fríggjadag 07.30 – 17.15.

Um eingin námsfrøðingur søkir verður hjálparfólk sett fyribils.

Skrivlig umsókn skal verða Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 01. mars 2010 kl. 12.

Fuglafjarðar kommuna
Ennivegur 38
FO-530 Fuglafjørður

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Philbrow, leiðari, telefon 73 77 91.

# LEIÐARI

## til Føroya Barnaheim

**Søkt verður eftir leiðara til Føroya Barnaheim at byrja 1. mars 2010 ella skjótast tilber.**

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur. Stovnurin hevur í dag eina deild, Ungdómsdeildina, sum kann hýsa 6 børnum. Harafturat er eitt bráðfeingispláss. Deildin hevur 8,5 fulltíðarstørv. Ætlandi verða broytingar gjørdar í næstum, sum kunnu hava við sær økt barnatal og tal á starvsfólki.

Endamálið við arbeiðinum á Ungdómsdeildini er fyrst og fremst at geva børnunum/teimum ungu umsorgan og tryggleika, samstundis sum dentur verður lagdur á at vísa á týdningin av gevandi og mennandi samveru. Hetta verður gjørt við einum skipaðum og viðkomandi gerandisdegi við áhuga og nærleika, við serligum átøkum, og ikki minst við regluligum samrøðum og øðrum uppbyggjandi samskifti. Tað er greitt mál hjá Ungdómsdeildini at hava gott samstarv við foreldur og játtandi myndugleikar, umframt aðrar viðkomandi starvsbólkar og stovnar.

Leiðarin hevur fakligu, fyrsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góð leiðara- og samstarvsevni, hevur áræði og dugir at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri brúkarar og starvsfólk.

Til starvið krevst útbúgving sum námsfrøðingur ella onnur líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

Starvið verður lønt smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Fríðu Patursson, stýrisfm. á tlf. 224969.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 18. februar 2010.

**Føroya Barnaheim, stýrið**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

# JØRÐ Á TVØROYRI TIL SØLU

Um hóskandi boð fæst verða hesar ognir seldar:

Matr. nr. 29a, Froðba – Tvøroyri.

Talan er um part (uml. 3/6) av ognini, sum er 3 lutir:

- í Skorðabø, 2.264 $m^2$ til víddar,
- í Heiðunum, 1.755 $m^2$ til víddar og
- í Skorðabø, 36 $m^2$ til víddar sambært tingbókini.

**Matr. nr. 32b, Froðba – Tvøroyri.**
Talan er um part (3/4) av ognini í Nississmørk, 960 m2 til víddar, sambært tingbókini.

**Matr. nr. 32c, Froðba – Tvøroyri.**
Talan er um part (3/4) av ognini, sum er 1 gyllin í Líðarhaga, mittasti partur.

**Matr. nr. 106, Froðba – Tvøroyri.**
Talan er um part (uml. 7/9) av ognini, sum er 1 gyllin í Líðarhaga, mittasti partur.

**Matr. nr. 132, Trongisvágur.**
Talan er um 1/2 av ognini.

**Innnnangarðs eru 3 lutir:**
- í trøðni av Ranghaga, 3.115 $m^2$,
- í trøðni av Hvammhaga, 7.747 $m^2$ og
- í Mýrunum, 1.926 $m^2$, samanlagt 12.788 $m^2$ sambært tingbókini.

**Uttangarðs:** 4 gyllin í Ranghaga.

**Matr. nr. 832a, Froðba – Tvøroyri.**
Talan er um part (uml. 7/9) av ognini, sum er eitt stykki í Støðlunum, til víddar 1.362 $m^2$ sambært tingbókini.

**Matr. nr. 834, Froðba – Tvøroyri.**
Talan er um part (1/2) av ognini, sum er eitt stykki í Støðlunum, til víddar 871 $m^2$ sambært tingbókini.

Nærri upplýsingar um ognirnar fáast við at venda sær til Eyðbjørn Larsen, adv. ft., tlf. 35 33 35, teldupost: eyl@jura.fo ella skrivaran Margit Jørgensen, teldupost msj@jura.fo.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

# HÚS TIL SØLU

## Nýggj tvíhús til sølu í Sundalagnum

TELEFON 56 20 70 / 56 20 80

# EYSTUROYAR BETONG

- grundir
- dekk
- múrar
- trappur
- garðar
- tún

o.a. betongarbeiði væl úr hondum greitt fyri kappingarførar prísir. Tilboð verða givin

TELEFON 56 20 70 / 56 20 71

RSF 1980

## Frá Róðrarsambandi Føroya

Lýst verður til ársaðalfund í ÍSF húsinum tann 13.03.2010 kl 10:00

Skrá sambært grein 4 í lógum hjá R.S.F.

**Róðrarsamband Føroya**